# Henry Andreasen er farin



**Týsdagin misti Klaksvíkin ein av sínum góðum monnum. Henry Andreasen, sum í mong ár hevur verið virkin trúboðari, andaðist týsdagin 16. apríl, 79 ára gamal**

MINNINGARORÐ
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Mong munnu minnast Henry sum talara á missiónsmøtum. Hetta dugdi hann so væl, at talur hansara enn sita fastar í minninum hjá fleiri fólkum. Henry hevur leitt mong fólk til Jesus, og hetta lá honum eisini nógv á hjarta.

Henry var ein játtandi kristin og bíbliukønur sum fáur, og hevði hann gjøgnum æviskeið sítt trúboðaravirksemi í ymsum londum.

Tó var hann mest í Føroyum, har hann tey síðstu mongu árini starvaðist sum skrivari hjá KFUM og K í Klaksvík.

Henry var giftur Honnu Viderø. Hanna kom upprunaliga av Sandi, men kom til Klaksvíkar í læru sum sjúkrasystur. Tað var eisini tá, at tey bæði hittust.

Hanna og Henry gjørdu eitt megnar arbeiði fyri tey ungu í KFUM og K. Henry sjálvur tók stóran lut í ungdómsarbeiðinum, og saman við Heina Lassen setti hann eisini KFUM- skótarnir í Klaksvík á stovn.

Miðskeiðis í fimti árunum vóru tey bæði sett í starv sum trúboðarar í Fuglafirði, eftir at tey høvdu verið í Danmark eina tíð. Tey vórðu verandi í Fuglafirði í seks ár, til tey aftur komu til Klaksvíkar sum trúboðarar. Stutt eftir hetta gjørdist Henry ferðatrúboðari hjá Heimamissiónini.

Seinnni arbeiddi Henry eitt skifti á sjómansheiminum í Føroyingahavnini í Grønlandi, og eisini virkaði hann í Íslandi og Onglandi fyri Sjómansmissiónina. Henry var altíð sera hjálpsamur móti fiskimonnum, og mong vinarbond vóru tá knýtt fyri lívið.

Eisini starvaðist Henry eitt skifti sum læraravikarur á Viðareiði, á Sandi og eisini í Klaksvík.

Hann var ein ágrýtin og samvitskufullur lærari, sum passaði sítt arbeiði til lítar.

Sum 66 ára gamal fekk Henry brádliga eina heilabløðing, sum hevði við sær, at onnur síðan lammaðist. Meðan hann í hesum sambandi lá á sjúkrahúsinum, plagdu heilir flokkar at vitja hann. Hann segði teimum so frá ymsum, tí tað dugdi hann so óføra væl.

Mong munnu eisini minnast Henry sum ein raskan grindamann, og mangar myndir av honum hava staðið í útlendskum bløðum og tíðarritum. Góður kvøðari var hann eisini, og sera snøggur í hondum.

Klaksvíkin hevur mist ein av sínum góðu monnum, og vit ynskja við hesum at lýsa frið yvir minnið um Henry Johan Andreas Andreasen.

Øll hava eina góða síðu – pop.fo hevur 100
Pop.fo er ein fesk síða við tónleiki og undirhaldi, sum hevur fleiri túsund vitjandi um mánaðin
Fylg við hvat er heitt & feitt – vitja pop.fo

Í Býin

Casablanca Ristorante
Hóskvøldið til og við sunnudagin
Bar-B-Cue
Veljið sjálvi, og lat Okkara kok steikja tað
ET TAÐ TÚ ORKAR
BERT 98,-
Bíleggið borð á tlf 319696

NÁTT-BUSSURIN
Tlf. 424254
Bussurnir: Tlf. 289254

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hyra bil - ring 311234
BENZIN DIESEL KIOSK
AUTO 311234

Hafnia Lounge

Í Býin
hvønn hósdag

Fríggjakvøldið
Double up
23.00-24.00
Diskotek
v/ Allan Poulsen
Leygarkvøldið
Ladies Night
til kl. 01.00
Diskotek
v/ Kristian Joensen
BAROK

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 26. apríl
• "Fimmari"
• Sjavskapping frá kl. 19.00
UNDIRHALD
Leygardagin 27. apríl
• Opið frá kl. 22.00
• Dansur frá kl. 24.00-04.00
BILL skipar fyri

Klubbadansur
Leygarkvøldið 27. apríl spæla
EXPRESS
KK

Felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
Pauli & Erling
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Leygarkvøldið Bingo kl. 20.00
Felagið Tórshøll Sverrisgøta 22 Tlf. 31 15 65

ÚT AT ETA -
Lat okkum um Uppvaskið:
MENU VIÐ 3 RÆTTUM
Einans 195,00 kr.
RIO BRAVO Tlf 319767 RESTAURANT
Rækjubland
Angus-búffur við pipar- ella Bernaise-sós
Ís-dessert
195,00 kr
Borðbílegging á tlf. 319767

KOM OG HITT
THOMAS H. & RENÉ
FRÁ BARRINI Á TV 3
SUM GESTABARVØRÐAR
26 OG 27 APRÍL
FRÁ KL 24:00
Discoteque Club 20
www.club20.fo

FK Matseðilin
Leygardagin 27. apríl: Oksasteik
Mánadagin 29. apríl: Millionbúff
Týsdagin 30. apríl: Fisk í fati
Mikudagin 1. mai: Hønsnarungar
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgarielle
Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík

hóskvøldið 25/04
■ Flaggdagshald hjá Tjóðveldisflokkinum
kl. 15.30-18.00
■ Hugnakvøld hjá Unga Tjóðveldinum & SU
kl. 22.00-04.00
LIVE TÓNLEIKUR & DISCOTEQUE
fríggjakvøldið 26/04
■ Danmarks best umtókti DJ
Buna Kjær
Ladies Night
leygarkvøldið 27/04
■ Danmarks best umtókti DJ
Buna Kjær
20 ára aldursmark
PLATFORM

Kaggin
Hetta vikuskiftið spæla
BASALT
www.kaggin.fo

Í Býin
hvønn hósdag